GÍ og NSÍ tóku seg frá hinum

Fótbóltur í 3. deild: Tað hevur verið tætt í toppinum, men hetta umfarið tóku GÍ og NSÍ seg eitt fet frá hinum liðunum

Tað hevur verið sera tætt í toppinum í 3. deild, men í sætta umfarið dragnaðu tvey av liðunum. Skála kláraði ikki at halda tveymálsleiðsluna móti NSÍ og tapti, og í Klaksvík tapti KÍ móti ÍF.

Gøtumenn høvdu tað trupult á Sandi, og ikki fyrr enn móti endanum av dystinum skoraðu teir málið, sum av gjørdi dystin. NSÍ kom afturum móti Skála, men vendi í seinna hálvleiki dystinum, so tað endaði 4-2 til NSÍ.

Seinasti dysturin var spældur í Vági, har Fram vitjaði. Dysturin endaði við tryggum sigri til VB.

NSÍ vendi oddadystinum

Mest spennandi dysturin hetta vikuskiftið var spældur í Runavík, har tvey av oddaliðnum hittust til dyst. Skála kom betri frá byrjan og í fyrra hálvleiki skoraðu teir tvær ferðir móti NSÍ. Jan Højgaard kom ímillum, tá NSÍ'arnir tveittu innkast uttan adressu, og so lyfti hann upp um NSÍ-málverjan. Beint fyri hálvleik økti Ólavur Olsen til 2-0, tá hann vann tvídyst við NSÍ-verjuspælara og skoraði.

Í hálvleikinum skifti NSÍ tveir spælarar út, umskipaði liðið, og sendi tríggjar mans heilt fram. Hetta gav úrslit og teir høvdu alt at siga seinnu trý korterini. Strandingurin hjá NSÍ, Regin Frederiksberg skoraði tvær ferðir innan fáar minuttir, og báðu ferð var uppskriftin tann sama. Hann fekk bótlin um brotsteigarmarkið, vendi sær á og sendi bóltin fram við málverjanum.

Eitt korter fyri leiklok stútaði Fróði við Rætt hornaspark frálíka væl upp í málhornið, og fimm minuttir seinni var allur ivi um úrslitið beindur av vegnum, tá Álvur Jacobsen frá 20 metrum smekkaði returbólt frá Skála-verjuni í málið til 4-2.

NSÍ fekk ein kvøkk í fyrra hálvleiki, men við góðum innsatsi í seinna hálvleiki bjargaðu teir sær sigurin.



Mortan Thomsen, sum ikki kom á vøllin, tá 1. deild spældi, skoraði tvær ferðir uppá brotsspark, tá ÍF vann sín fyrsta dyst í ár. Tað var í Klaksvík móti KÍ, sum framvegis er nummar 3 í deildini. Mynd: Elisabeth G. Magnussen

HB betri mannað

Í Havn vann HB óvæntaðan stórsigur móti sørvingum. HB-liðið var betri mannað hesaferð, og fleiri unglingaspælarar, sum ikki áður hava spælt við, vóru við hesaferð. Teir eru í góðari venjing og orka betri enn miðal 3. deildarspælarin.

Tað var fyrst og fremst hetta sum gjørdi, at HB stýrdi dystinum og vann tryggan sigur. Eyðun Højgaard legði fyri, tá hann gjørdist púra leysur. SÍ'arnir vildu vera við at hann var rangstaddur, men málið stóð við. Hans Thomassen økti við frálíka góðum skoti frá brotsteigarmarkinum. Hartvig stútaði til 3-0, sum var hálvleiksstøðan. Jákup Danielsen økti til 4-0 og Hartvig til 5-0 við opnum kjansi. Kaj á Stongum minkaði til 5-1, áðrenn Hartvig enn einaferð gjørdist leysur og skoraði.

Hetta var bert næsti sigurin hja HB í ár, men verður manningin eins góð næstu dystirnar, eru møguleikarnir góðir fyri at økja um stigatalið.

ÍF vann umsiðir

Í Klaksvík snávaði oddaliðið KÍ móti botnliðnum ÍF, sum undan dystinum bert hevði vunnið sær eitt stig. Dysturin var javnur, og spælið gekk mesta av tíðini báðar vegir, men ÍF'arnir vóru stinnari í álopspartinum, samstundis sum verjan var væl skipað. Teir fingu fyrsta málið, tá KÍ'ari sparkaði innlegg í egið mál, men stutt eftir javnaði Jón Simonsen við góðum skoti úti frá.

Jákup Helgi Egholm stóð við endan, eftir enn eitt KÍ-verjumistak, og so var 2-1. Jóannes Jakobsen skoraði aftur hendan dystin beinleiðis við frísparki og gjørdi tað til 2-2, áðrenn Mortan Thomsen, sum var við á 1. deild, men ikki kom inn, legði ÍF fram um 3-2 við brotssparki. Hann økti til 4-2 eftir enn eitt brotsspark, áðrenn Tórfinn Nón sementeraði fyrsta sigurin hjá ÍF í ár.

Klaksvíkingar vóru misnøgdir við avrikið hjá dómarabólkinum av Eiði, sum teir hildu vera alt annað enn gott.

Skoraðu í síðstu løtu

A Sandi fekk GÍ tað óvæntað trupult við at fáa øll stigini við sær norðuraftur, og júst sum hjá 1. deildarliðnum, var tað ikki fyrr enn móti endanum, at avgerðin fall.

GÍ var annars á odda 2-0 í hálvleikinum. Hans Jákup Mikkelsen legði gøtumenn á odda, tá korter var spælt. Hann fekk bólt úr vinstru, dróg nakað og sendi so í málið. Kim Petersen økti tá 39 minuttir vóru farnir. Hann fekk bólt frá Bárði Heinason, sum var komin til baklinjuna, og so var tað ikki so trupult, at fáa bóltin um málstrikuna.

GÍ var munandi betri í fyrra hálvleiki, men tá motivatiónin fór at svíkja í seinna hálvleiki og spælið gjørdist rótut, kom B71 alsamt meira við í dystin.

Mourits Viderø og Schønning Hentze syrgdu fyri, at B71 javnaði GÍ-leiðsluna. Seinna málið hjá B71 kom tá 77 minuttir vóru spældir.

Tríggjar minuttir fyri leiklok var toppskjúttin í 3. deild Pól Andreas Jacobsen har hann skuldi vera. Hornaspark var sent inn úr høgru, og inn fyri málinum var Poul Andreas fyrstur á og stútaði í kassan. 3-2 til GÍ og oddastøðan í deildini var harvið vardveitt.

VB vann á Fram

Seinasti dysturin hetta umfarið var spældur í Vági, har VB hevði vitjan av Fram. Her endaði tað við tryggum sigri til VB, sum hevði leikliga yvirvág mesta av tíðini. Fram hevði onkrar møguleikar at gera mál, men tað var í lagið, at VB vann við greiðum muni.

Málini hjá VB skutu Sigmund Mikkelsen, Elnar Holm og Petur Óli Samuelsen, sum hevur roynt seg á 1. liði í ár.

Næsta umfar í 3. deild skal eftir ætlan spælast komandi vikuskiftið, og tá hittast tey soleiðis: GÍ-KÍ, Skála-VB, Fram-HB, SÍ-B71 og ÍF-NSÍ.

ek

Hagtølini í 3. deild

6. umfar, 1. juni

KÍ-ÍF 2-5 (2-3)
0-1: Sjálvmál
1-1: Jón Simonsen
1-2: Jákup Helgi Egholm
2-2: Jóannes Jakobsen
2-3: Mortan Thomsen (br.)
2-4: Mortan Thomsen (br.)
2-5: Tórfinn Nón

VB-Fram 3-0 (1-0)
1-0: Sigmund Mikkelsen
2-0: Elnar Holm
3-0: Petur Óli Samuelsen

HB-SÍ 6-1 (3-0)
1-0: Eyðun Højgaard
2-0: Hans Thomassen
3-0: Hartvig Joensen
4-0: Jákup Danielsen
5-0: Hartvig Joensen
5-1: Kaj á Stongum
6-1: Hartvig Joensen

B71-GÍ 2-3 (0-2)
0-1: Hans Jákup Mikkelsen
0-2: Kim Petersen
1-2: Mourits Viderø
2-2: Schønning Hentze
2-3: Pól Andreas Jacobsen

NSÍ-Skála 4-2 (0-2)
0-1: Jan Højgaard
0-2: Ólavur Olsen
1-2: Regin Frederiksberg
2-2: Regin Frederiksberg
3-2: Fróði við Rætt
4-2: Álvur Jacobsen

Støðan

1. GÍ	6	5-1-0	13-8	16
2. NSÍ	6	5-0-1	25-9	15
3. KÍ	6	4-0-2	23-12	12
4. Skála	6	4-0-2	18-10	12
5. VB	6	3-1-2	21-9	10
6. SÍ	6	3-0-3	18-19	9
7. HB	6	2-0-4	19-33	6
8. ÍF	6	1-1-4	12-23	4
9. Fram	6	1-0-5	6-22	3
10. B71	6	0-1-5	11-30	1

Málskjúttar

Pól Andreas Jacobsen, GÍ	(1) 9
Jón Nielsen, SÍ	7
Jákup Danielsen, HB	(1) 6
Jack Jakobsen, NSÍ	6
Egill Steintórsson, VB	6
Hilmar Hansen, SÍ	5
Arthur Johansen, Skála	5
Regin Frederiksberg, NSÍ	(2) 4
Fróði við Rætt, NSÍ	(1) 4
Sigmund Mikkelsen, VB	(1) 4
Karl Johannesen, Fram	3
Magni Jacobsen, GÍ	3
Kim Petersen, GÍ	(1) 3
Hans Thomassen, HB	(1) 3
Jákup Helgi Egholm, ÍF	(1) 3
Mortan Thomsen, ÍF	(2) 3
Bárður Andreasen, KÍ	3
John Hansen, KÍ	3
Jóannes Jakobsen, KÍ	(1) 3
Shønning Hentze, B71	(1) 2
Allan Simonsen, B71	2
Mourits Viderø, B71	(1) 2
Ásmund Zachariasen, B71	2
Leivur Holm, HB	2
Hartvig Joensen, HB	(2) 2
Torfinn Nón, ÍF	(1) 2
Eyðun Jacobsen, KÍ	2
Helmar Lassen, KÍ	2
Jón Simonsen, KÍ	(1) 2
Poul Juul Vilhelmsen, KÍ	2
Dánial Hansen, NSÍ	2
Anton Højgaard, NSÍ	2
Sjúrður í Skemmuni, NSÍ	2
Kaj á Stongum, SÍ	(1) 2
Jonhard Frederiksberg, Skála	2
Pauli Hansen, Skála	2
Magnus Jacobsen, Skála	2
Ólavur Olsen, Skála	(1) 2
Arnjohn Hvítklett, SÍ	2
Palli Augustinussen, VB	2
Niclas Ludvig, VB	2